LM-070/2020

AKT 26 Hoyringssvar frá Fakfelagssamstarvinum

Svarskriv frá Fakfelagssamstarvinum

Fakfelagsssamstarvið sendir við hesum sínar hoyringsviðmerkingar til uppskot um broyting í løgtingslóg um eftirløn og løgtingslóg um skatt av rentutryggingum.

Í verandi pensjónsskipan er kravda inngjald til egna pensjón 6% í 2020 og sambært verandi lóg, skal hetta gjaldið hækka í 12% í 2026. Áður hevur ætlanin verið, at kravda gjaldið skuldi hækka í 15% í 2019, men undanfarna samgonga broytti hetta í samband við, at inngjaldið til AMEG hækkaði í 3%.

Í uppskoti til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirløn (Eftirløn arlógin) er ætlanin at broyta hetta aftur, soleiðis at kravda inngjaldið aftur skal verað 15% í 2029.

Fakfelagssamstarvið vil staðiliga heita á Fíggjarmálaráðið, um ikki at broyta hetta. Fakfelagssamstarvið metir, at verandi skipan, har 3% verða goldin til AMEG og mestakravið á 12% verður goldið til egna pensjón, er nøktandi fyri uppspararan.

At uppsparingin við tíðini gerst 1/5 minni av at 12% og ikki 15% verður goldið inn er rætt, men hetta merkir ikki, at uppspararin fær 1/5 meira útgoldið, um markið verður hækkað aftur til 15%. Orsøkin er, at eyka inngjaldið, ið førir við sær hægri uppsparda pensjón, verður útlíknað av øktari mótrokning. Uppspararin fær soleiðis als ikki fær meira burturúr, av at spara meira upp.

Umframt hetta vil Fakfelagssamstarvið staðiliga heita á Fíggjarmálaráðið, um framhaldandi at lata skipanina við AMEG halda óbroytta fram. Fakfelagssamstarvið tekur fullt undir við hesi samhaldsføstu skipan, sum á besta mun tryggjar limaskaran og samstundis ávirkar útgjaldið frá AMEG ikki mótrokningina.

Arbeiðsmarknaðurin eigur og rektur skipanina og almennu mynduleikarnir eiga at lata hesa skipan fáa frið. Skipanin hevur víst seg at roynast væl í verki og Fakfelagssamstarvið kann í hesum sambandi vísa á áður innsenda áheita um, at lata skipanina fáa frið.

Sagt verður frá hesum.

Tórshavn 10/2-2020

Fakfelagssamstarvið